# Vanrøkt mundi ført til syndarliga vanlukku

**– Tað var vanrøkt í sambandi við arbeiðið at gera Hovstunnilin, ið førdi til óhappið, ið akkurát tað sama kundi kosta mannalív, sigur Simona Jensen. Tí fer hon eisini at krevja, at byggifelagið, sum ger tunnilin, ella Landsverk, betala bilin aftur**

ÓHAPP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Her á leið hendi óhappið, Vegurin var fullur av vátari runu og tí sum flundrubak at koyra eftir. Samstundis er grivið heilt innundir vegin, so øll vegøkslin er burtur, so har var onki at geva av. Eftir óhappið eru endurskin, skelti og ljós sett upp fyri at merkja vegin betri*

– Tað var ikki ófantalig koyring, men líkasæla, sum førdi til óhappið. Og tí skal eg ikki hava skyldina.

Simona Jensen, sum átti og koyrdi bilin, sum fór útav í Tjaldavík, sigur, at orsøkin til at tey fóru útav, var, at byggifelagið, sum ger Hovstunnilin, hevði gjørt koyrivegin til eitt runudíki og sostatt hevði misrøkt sína skyldu at halda vegin tryggan at koyra eftir.

– Tað var tjukt av runu á vegnum og tá ið tað harafturat hevði regnað illa, var tað sum at koyra á ísi.

Hon sigur, at umframt at hava gjørt vegin til eitt runudíki, høvdu teir eisini grivið heilt inn undir vegjaðaran, so har var onki var at geva av, tí øll vegøkslin var burtur.

– Tað var so hált á vegnum, at eisini fólk, sum komu til hjálpar í sambandi við óhappið, høvfu torført at fóta sær og bæði løgreglubilur og sjúkrabilar høvdu mundu komið í óføri.

Harumframt heldur hon ikki, at skeltingin var nøktandi.

– Tað kundi ganga, tá ið koyrt var í vanliga sporunum, men av tí at eg møtti bilum, mátti eg út í síðuna og har fór bilurin á glið, uttan at eg fekk gjørt nakað sum helst. Tað var myrkt og tað regnaði illa, so sýnið var avbera vánaligt, so eg var tikin fullkomiliga á bóli av at enda í slíkari hálku so brádliga.

### Vil hava endurgjald fyri bilin

Hon heldur tí, at hon skal ikki hava skyldina fyri óhappið og tað skal tískil heldur ikki vera hennara trygging, sum betalir bilin aftur.

– Byggifelagið, sum ger Hovstunnilin, ella Landsverk sjálvur, skulu átaka sær ábyrgdina av óhappinum og teir skulu eisini veita endurgjald fyri bilin, staðfestir hon.

Hon sigur, at byggifelagið og Landsverk hava gjørt eitt stórt byggipláss í sambandi við Hovstunnilin. Men hóast byggiplássið gongur tvørturum landsvegin er alt ov lítið gjørt fyri at tryggja ferðsluna.

Tað er eisini ein spurningur um tað er rætt, at eitt stórt arbeiðspláss við nógvum, tungum og skitnum flutningi, kann leggjast tvørturum ein landsveg við nógvari ferðslu. Tað rætta hevði verið at syrgt fyri at lagt landsvegin uttan um arbeiðsplássið. Á øllum vanligum arbeiðsplássum hevur vanlig ferðsla onga atgongd.

Í øllum førum má minstakrav vera, at vegurin ikki er fullur av mold, men verður hildin reinur, so hann er forsvarligur at koyra eftir.

Tí hevur tað eisini prinsipiellan týdning at byggifelagið ella Landsverk átekur sær skyldina.

– Fái eg skyldina, er byggifelagið samstundis fríkent og so er felagið samstundis frítikið fyri sína skyldu at syrgja fyri, at landsvegurin er forsvarligur at koyra eftir, men kann halda fram at dálka sum tað vil.

Tey hava eisini tosað við byggifelagið um endurgjald fyri bilin.

– Í fyrstuni vóru teir rættiliga avvísandi, men tað tað endaði kortini við, at teir vildu kanna málið.

Byggifelagið má eisini innast inni hava viðurkent sína ábyrgd, tí aftaná óhappið var beinanvegin farið at spula og sópa vegin og tað var eitt arbeiði, sum vardi alla náttina.Nú eru eisini endurskin, ávaringarljós og skelti sett upp.

# Okkurt hevur svikið

**Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, ásannar, at vegurin var ikki tryggur at koyra eftir og tí re okkurt, sum hevur svikið**

ÓHAPP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Arbeiðið at gera Hovstunnilin er byrjað Grivið er út fyri nýggjum vegi og grivið er eisini út fyri inntakinum til sjálvan tunnilin. Alt økið er tí eitt stórt byggipláss. Men byggiplássið gongur tvørturum landsvegin. Hetta kvøldið, óhappið hendi, var vegurin ikki reinsaður og hann var tí so skitin og hálur, at hann var lívshættisligur at koyra eftir og tað er eitt satt undur at stórur skaði ikki stóðst av hesum*

– Tað er okkurt, sum hevur svikið, tí vegurin var ikki tryggur at koyra eftir.

Tað ásannar Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Tað er Landsverk, sum hevur eftirlitið við landsvegunum. Og nú farið er undir arbeiðið at gera Hovstunnilin, er tað eisini Landsverk, sum er byggiharri.

Í aðrari grein her á síðuni, greiða vit frá óhappi, sum fýra ungfólk sluppu ótrúliga væl frá. Óhappið hendi á staðnum, har arbeiðið upp á tunnilin er byrjað. Byggiplássið gongur tvørturum landsvegin, men tá ið óhappið hendi, var vegurin fullur av vátari runu og sostatt ógvuliga hálur og av tí sama misti førarin tamarhaldið á bilinum.

Førarin staðfestir, at sostatt hevur byggifelagið, sum ger tunnilin ikki røkt sína skyldu at halda vegin tryggan at koyra eftir og tí er tað eisini byggifelagið, sum hevur skyldina av óhappinum og eigur at veita endurgjald fyri bilin, sum varð vrak.

Og Oyvindur Brimnes ásannar, at umstøðurnar á vegnum vóru ikki ílagi. Hann hevur fingið eina frágreiðing um óhappið og hann ásannar, at vegurin var fullur av runu og sera hálur.

– Samstundis varð grivið heilt innundir vegin, so at vegøkslin eisini var burtur. Undir slíkum umstøðum sigur tað seg sjálvt, at viðurskiftini vóru ikki so trygg sum tey áttu.

### Okkurt sveik

Oyvindur Brimnes ásannar, at sostatt er okkurt, sum hevur svikið og Landsverk fer nú at kanna, hvar svíkurin er.

– Landsverk hevur myndugleika yvir landsvegunum og hann hevur eftirlitið við, at hann er tryggur at koyra eftir.

– Eftir óhappið gjørdi eftirlitið hjá Landsverki gjørdi skjótt av og fekk viðurskiftini í rættlag beinanvegin í samráð við løgregluna. Samstundis fekk byggifelagið, sum ger Hovstunnilin, boð um at reinsa vegin so at hann var tryggur at koyra eftir.

Í sama viðfangi er eisini bøtt um skeltingina á strekkinum, ið arbeitt verður á.

Men Landsverk er eisini byggiharri í sambandi við Hovstunnilin.

– Tá ið Hovstunnilin varð bjóðaður út, eru eisini ásetingar um trygdina. Eitt nú er tað eitt krav, at landsvegurin skal vera tryggur.

– Tað var hann ikki í hesum føri og sostatt er okkurt í skipanini, sum er svikið, tí tá ið vegurin er fullur av runu og hálvur, er trygdin ikki forsvarlig, staðfestir Oyvindur Brimnes.

Hann sigur, at heldur byggifelagið ikki treytirnar um at halda vegin tryggan, eigur eftirlitið hjá Landsverki at gera vart við seg og fáa viðurskiftini í rættlag.

Í hesum sambandi verður nú kannað, hvør hevur svikið í hesum føri - um tað er byggifelagið, sum ikki hevur hildið treytirnar, ella um viðurskiftini hava verið í ólagi so mikið leingi, at eftirlitið hjá Landsverki átti at havt varnast tað og sostatt átti at havt steðga tí.

Hann sigur, at áðrenn tað er greitt, hvør hevur skyldina av støðuni, ber heldur ikki til at siga, hvør skal endurgjalda skaðan.

Kortini sigur Oyvindur Brimnes, at nú verður fylgt sera gjølla við, at treytirnar verða hildnar.

Annars fegnast hann um, at tey fýra ungfólkini sluppu so væl frá óhappinum sum tey gjørdu og at størri skaði ikki stóðst av óhappinum.